# Hákun Djurhuus formaður í Smyril Line



*Frá at hava verið stjóri í Shell seinnu árini er Hákun Djurhuus nú nevndarformaður í Smyril Line*

*Savnsmynd*

**Frá Smyril Line til Shell og frá Shell til Smyril Line. Fyri nøkrum vikun síðani tók marknaðarleiðarin á Smyril Line, Hendrik Egholm, við sum stjóri á Shell, har hann avloysti Hákun Djurhuus. Á eykaðalfundi fríggjadagin varð sami Hákun Djurhuus valdur til nevndarformann í Smyril Line**

VINNULÍV
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Tað er Framtaksgrunnurin, sum hevur valt Hákun Djurhuus í nevndina í staðin fyri Andras Róin, ið sum kunnugt nú er stjóri í Smyril Line.

Leif Abrahamsen er eisini farin úr nevndini, og fyri hann er valdur Vilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum. Tað er ein annar stórur partaeigari, TF Holding, sum hevur valt Vilhelm Petersen í nevndina hjá Smyril Line.

Spurdur um hvørji mál hann hevur sett sær sum formaður, sigur Hákun Djurhuus, at enn er hetta so nýtt, at hann fyrst má seta seg inn í felagið, áðrenn hann kann siga nakað ítøkiligt.

- Fremsta uppgávan hjá eini nevnd og nevndarformanni er at vera sparringspartnari hjá stjóranum, sigur Hákun Djurhuus.

Hann vísir á, at frá at geva hall javnvigaði úrslitið í fjør, og nú er so uppgávan at fáa avlop á raksturin.

Tveir teir seinastu nevndarformennirnir í Smyril Line er sjálvir blivnir stjórar í fyritøkuni. Fyrst Tummas Magnussen, ið kom inn fyri Óla Hammer og síðani Andras Róin, ið avloysti Tummas Magnussen.

Fert tú at fylgja hesi traditiónin?

Spurdur um hann fer at fylgja hesi traditiónini, sigur Hákun Djurhuus flennandi, at tað ætlar hann ikki.

- Andras Róin kann vera púra róligur. Hann hevur gjørt tað gott sum stjóri í Føroya Tele, og tað vænti eg eisini, at hann fer at gera í Smyril Line, sigur nývaldi nevndarformaðurin í Smyril Line.

Hinir báðir nevndarlimirnir í felagnum eru íslendingurin, Jónas Halgrimsson og hetlendingurin, Robert Hunter.



# Íløguspæl í luftina í morgin

**Teir útvið 2.000 føroyingarnir, sum herfyri teknaðu seg til íløguspælið hjá Kaupthing Bank og Sosialinum, sleppa nú at royna seg. Eftir tekniskar trupulleikar fyrru ferð er spælið nú klárt og byrjar í morginári**

SPÆL
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Fyrsta føroyska íløguspælið fyri føroyingar fer av bakkastokki týsmorgunin 25. septembur klokkan 08:15. Hetta merkir, at teir útvið 2.000 føroyingarnir, sum longu hava meldað seg til spælið, nú sleppa at royna seg á norðurlendsku partabrævamarknaðunum. Onnur sleppa eisini við, tí fram til 5. oktobur er gjørligt at melda seg til spælið, sum erókeypis.

Spælið er ment av roynda bretska felagnum BullBearings beinleiðis til Kaupthing Bank, men skipanin aftanfyri er roynd um allan knøttin. Millum annað hava stórfyritøkurnar Barclays Bank, Yahoo og avstralski virðisbrævamarknaðurin brúkt skipanina hjá BullBearings.

## Góðir vinningar

Av tí at talan er um eitt spæl, sleppa spælararnir at merkja viðurskiftini á partabrævamarknaðunum í veruleikakendum umhvørvi, uttan at átaka sær nakran peningaligan váða. Royndirnar, sum fáast við at vera við í spælinum, kunnu tí gerast virðismiklar og kunnu síðani nýtast í veruliga lívinum. Hesar royndirnar eru ókeypis.

Nógv er at vinna við at luttaka í spælinum, tí tann spælarin, sum hevur staðið seg best tá íløguspælið endar 11. januar 2008 vinnur 50.000 krónur. Nummar tvey fær 25.000 krónur og nummar trý fær 10.000. Vinnararnir verða kunngjørdir í Miðlahúsinum 14. januar 2008. Umframt hesar vinningar vera eisini aðrir vinningar latnir meðan spælið er í gongd.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Olav Askildsen**
Tórshavn

andaðist leygardagin 22. september, 68 ára gamal.
Bønarhald verður í Ebenezer týsdagin kl. 15.
Jarðarferðin verður mikudagin kl. 13.

*Familjunnar vegna*
**Herfríð, Eyðun, Svein, Anfinn, Sunlin og Ingun**

Tey, ið vilja minnast Olav, kunnu lata Kristnastovu í Keypmannahavn ein gávu á konto í peningastovnunum

**Dagurin**
**25. september. Kleofas.** Annar av lærusveinunum, sum á veg til Emmaus hittu hin upprisna (Luk. 24. 13-35).

†

## Andlát og jarðarferðir

Í samband við jarðarferðina hjá **(Jonn) John Poulsen**, verður minningarhald týsdagin í Kristnastovu, Birmavej 36 í Keypmannahavn kl. 14:30. Jarðarferðin verður úr Berøa í Runavík hósdagin klokkan 14:00.

**Martha Joensen í Miðvági**, ættað úr Sørvági, andaðist leygardagin, 79 ára gomul. Tey, ið vilja minnast Marthu, kunnu lata Missiónshúsinum eina gávu. Konta í peningastovnunum.

**Martin Jakobsen**, ættaður av Glyvrum, fer til gravar úr Havnar Kirkju mikudagin kl.14. Bønarhald verður í Havnar Kirkju týsdagin kl. 17

**Olav Askildsen í Tórshavn** andaðist leygardagin, 68 ára gamal. Bønarhald verur í Ebenzer týsdagin klokkan 15. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 13.

**Louisa Olsen á Ryggi í Miðvági** fer til gravar úr Miðvágs kirkju mikudagin klokkan 14.

